## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og sólglottar, men eisini sirm ella mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av landsynningi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av eystri. Stundum sirm ella mjørki og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og mánadagin yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.

# Atlantic Airways sett nýggjan sølu- og marknaðarleiðara

**Jákup Sverri Kass skal taka við sum sølu- og marknaðarleiðari í Atlantic Airways í næstum. Jákup Sverri hevur arbeitt innan sølu- og marknaðarføring í Smyril Line síðani 2006 og seinastu tvey árini hevur hann verið sølu- og marknaðarleiðari sigur felagið frá í tíðindaskrivi**

**MARKNAÐARLEIÐARI**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*




*Jákup Sverri Kass er settur sum sølu- og marknaðarleiðari í Atlantic Airways. Hann sigur seg fara frá einum spennandi og vælkoyrandi felag til eitt annað spennandi felag í somu vinnugrein.*

Jákup Sverri er útbúgvin Cand.ling.merc. frá Handilsháskúlanum í Århus. Hann er giftur Poulu Michelsen Kass og tey eiga trý børn.

- Fyri meg er tað bæði ein stór avbjóðing og ein heiður at taka við starvinum, sum sølu- og marknaðarleiðari í tjóðarflogfelagnum. Tað er ein spennandi uppgáva at menna ferðasambandið hjá føroyingum til útheimin, men tað er eisini ein sera spennandi avbjóðing at fáa fleiri fremmandar gestir til Føroya at vitja, sigur Jákup Sverri Kass.

Tað er ikki ein ”bittur” ella ónøgdur maður, sum fer frá Smyril Line, men tvørturímóti ein maður, sum vil royna nakað nýtt innan fyri somu bransju. –Eg kom til Smyril Line í 1997 og havi verið feriuavloysari til 2006, tá eg so flutti heimaftur til Føroya. Síðani tá havi eg havt eitt sera spennandi og avbjóðandi starv. Hetta er eitt spennandi felag við einum góðum stjóra og starvsfólki og eini spennandi framtíð, sum eg nú fari frá. Felagið er sera væl útgjørt til framtíðina. At eg so rými frá øllum hesum kemst av, at mær nú stendur í boði enn eitt spennandi starv innan somu vinnu, tó at munurin er flogferðsla í mun til sjóvegis ferðsla. Flogferðsluøkið er eisini í stórari menning, eitt nú verður flogvøllurin útbygdur, og Altantic hevur gjørt íløgur í nýggj flogfør, sum styrkja felagið. Sjálvandi er tað eisini spennandi at skula arbeiða saman við Magna Arge og eini nýggjari nevnd, og tað er sum sagt ikki á hvørjum degi, at slíkt avbjóðandi starv stendur tær í boði.

Jákup Sverri Kass ynskir Smyril Line og sínum starvsfeløgum har alt tað besta og góða víðari eydnu. Hann leggur dent á, at her eru eingi ”bad feelings” millum seg og Smyril Line, tvørturímóti er tað í fullum forstáilsi við leiðsluna í Smyril Line, at hann nú fer at royna eina aðra grein í hesi vinnuni.

Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, sigur í stuttari viðmerking, at hann er fegin um at fáa Jakup Sverra umborð: „Hann hevur royndir og eginleikar, sum hóska væl til okkara felag og okkara virksemið.“

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 15 |
| Lerwick | 18 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 26 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 24 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 28 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1017 hPa. við Írland fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

**Komandi nátt:**
Brúgvalagið við Føroyar fer spakuliga í útnyrðing, so lýggj og slavin luft rekur móti Føroyum av landsynningi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/07 kl. 06⁰⁰ – 02/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 13,2°
Minsti hiti máldur í juli: -8,7° - Mesti hiti máldur í juli: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/07 kl. 06⁰⁰ – 02/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 23. juni | Mánin næstur jørðini |
| 29. juni | Fyrra tendring |
| 4. juli | Jørðin longst frá sólini |
| 7. juli | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. juli | 03:37 | 16:00 | 02:37 | 15:00 | 02:52 | 15:15 | 05:37 | 18:00 | 06:37 | 19:00 | 01:52 | 14:15 | 00:52 | 13:15 | 03:52 | 16:15 | 04:52 | 17:15 | 03:22 | 15:45 | 04:37 | 17:00 |
| 3. juli | 04:24 | 16:49 | 03:24 | 15:49 | 03:39 | 16:04 | 06:24 | 18:49 | 07:24 | 19:49 | 02:39 | 15:04 | 01:39 | 14:04 | 04:39 | 17:04 | 05:39 | 18:04 | 04:09 | 16:34 | 05:24 | 17:49 |
| 4. juli | 05:14 | 17:39 | 04:14 | 16:39 | 04:29 | 16:54 | 07:14 | 19:39 | 08:14 | 20:39 | 03:29 | 15:54 | 02:29 | 14:54 | 05:29 | 17:54 | 06:29 | 18:54 | 04:59 | 17:24 | 06:14 | 18:39 |
| 5. juli | 06:04 | 18:27 | 05:04 | 17:27 | 05:19 | 17:42 | 08:04 | 20:27 | 09:04 | 21:27 | 04:19 | 16:42 | 03:19 | 15:42 | 06:19 | 18:42 | 07:19 | 19:42 | 05:49 | 18:12 | 07:04 | 19:27 |
| 6. juli | 06:51 | 19:15 | 05:51 | 18:15 | 06:06 | 18:30 | 08:51 | 21:15 | 09:51 | 22:15 | 05:06 | 17:30 | 04:06 | 16:30 | 07:06 | 19:30 | 08:06 | 20:30 | 06:36 | 19:00 | 07:51 | 20:15 |



Forelskað?
Vís tað í Sosialinum

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo